**Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 88/2012: Uppskot til samtyktar um føroyskan realkredittmarknað**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um:

> at gera og leggja fyri Løgtingið óhefta frágreiðing, ið lýsir fyrimunir og vansar við føroyskum realkredittmarknaði og lýsir, hvat skal til fyri at seta í verk ein føroyskan realkredittmarknað.

**Viðmerkingar**

Atgongdin til fígging til kappingarføran kostnað er týðandi fyri føroyska samfelagið, vinnulívið og føroyingar allar.

Føroyski fíggjarmarknaðurin bjóðar í dag eina røð av fíggjartænastum til føroyingar, men kostnaðurin á fíggjartænastum í Føroyum er í dag sera høgur í mun til í grannalondum okkara.

Hetta hevur avleiðingar fyri alt kostnaðarstøðið í føroyska samfelagnum, fyri kappingarførið hjá vinnuni og fyri gerandisdagin og keypiorkuna hjá føroyskum húskjum.

Millum fíggjarligu tænasturnar til føroyingar eru donsk realkredittlánsbrøv. Hesi hava víst seg at fáa undirtøku millum nógvar føroyingar.

Hóast hetta, so er enn eingin óheft meting gjørd, ið endaliga kann staðfesta, hvørt tað er viðkomandi at stovnseta ein føroyskan realkredittmarknað, og um so verður, hvussu hesin skal verða skipaður.

Vit vita tó, at føroyskar fyritøkur geva út lánsbrøv, og somuleiðis gevur Landsbankin vegna landsstýrið út lánsbrøv. Hetta hevur víst seg at vera ein góður fíggingarháttur, og tí eiga vit at fáa staðfest endaliga – og frá óheftari síðu – hvørt ein føroyskur realkredittmarknaður kann verða gagnligur fyri føroyingar og føroyska samfelagið.

Staðfestast kann í hvussu er, at føroyingar rinda nærum 2 % í “bidrag” oman á vanligu rentuna á útlendsku realkredittlánsbrøvunum, og hetta ger tað ikki minni viðkomandi at fáa staðfest, um føroysk realkredittlánsbrøv eitt nú kundu tryggjað eina kappingarføra rentu til allar føroyingar.

Løgtingið hevur áður heitt á landsstýrið um at gera nakað við hetta málið, tó uttan at nøkur óheft frágreiðing er gjørd. Bert danski tjóðbankin er spurdur um málið, men hesin kann neyvan sigast at vera óheftur í hesum máli fyri Føroyar.

Tað er alneyðugt, at landsins leiðsla kemur við greiðum boðum um, hvørji átøk skulu fremjast, soleiðis at vit fáa ein føroyskan fíggjarmarknað, sum í mest møguligan mun tryggjar áhugamál føroyinga nú og frameftir. Verður hetta uppskot framt í verki, fer hetta at vera eitt fet á leiðini.

**Á Løgtingi, 20. februar 2013**

| | | |
|---|---|---|
| Kristina Háfoss | Gunvør Balle | Høgni Hoydal |
| Bjørt Samulsen | Páll á Reynatúgvu | Sirið Stenberg |